



## Varaløgmaður verður varaskúalstjóri hjá systir løgmanni

Bjarni Djurholm má nú venja seg við lívið sum vanligur borgari. Hann var ikki afturvaldur á løgtingsvalinum 19. januar, og nú nýtt landsstýrið er skipað millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldið og Miðflokkin, verður hann heldur ikki landsstýrismaður. Í skrivandi stund er Bjarni Djurholm landsstýrismaður – og varaløgmaður. Í hansara borgarliga starvi er hann varaskúlastjóri í Eysturskúlanum í Havn. Skúlastjóri eri Eyðdis Eidesgaard – sum er lítlasystir Jóannes Eidesgaard, løgmann. Sostatt fer Bjarni Djurholm frá sum varaløgmaður hjá Jóannes Eidesgaard til at vera varaskúlastjóri hjá systir Jóannes Eidesgaard, Eyðdis Eidesgaard...

# 78 fólk hava sitið í landsstýrinum

**22 landsstýri hava sitið í teimum 18 valskeiðunum, sum hava verið síðani vit fingu heimastýrislógina í 1948. 78 fólk hava mannað hesi landsstýri,.**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Síðani Føroyar fingu heimastýri í 1948 hava vit havt 22 skrásett landsstýri. Hóast vit hava havt løgtingsval 17 ferðir síðani, so eru landsstýri umskipað nakrar ferðir.

Áðrenn nýggju stýrisskipanarlógina, sum kom at virka fult út frá løgtingsvalinum í 1998, var landsstýrið eitt kollegialt stýri, sum varð valt av løgtinginum. Nú er tað løgmaður, sum verður valdur av løgtinginum, og hann tilnevnir hini landsstýrisfólkini.

Á listanum niðanfyri síggja vit, hvussu leingi hesi 78 fólkini hava sitið í landsstýrinum. Vit síggja eisini, hvussu leingi tey 11, sum hava verið løgmenn, hava sitið.

Teir fýra løgmenninir, Andrass Samuelsen, Petur Mohr Dam, Pauli Ellefsen og Edmund Joensen, hava ikki sitið sum vanligir landsstýrismenn – einans sum løgmenn.





**Løgmenn, sum ikki hava verið landsstýrismenn:**

| | |
|---|---|
| Petur Mohr Dam | 6 |
| Pauli Ellefsen | 4 |
| Edmund Joensen | 4 |
| Andrass Samuelsen | 2 |

**Allir løgmenn Føroya:**

| | |
|---|---|
| 1. Atli Dam | 17 |
| 2. Kristian Djurhuus | 10 |
| 3. Anfinn Kallsberg | 6 |
| 4. Petur Mohr Dam | 6 |
| 5. Hákun Djurhuus | 4 |
| 6. Pauli Ellefsen | 4 |
| 7. Edmund Joensen | 4 |
| 8. Jóannes Eidesgaard | 4 |
| 9. Andrass Samuelsen | 2 |
| 10. Jógvan Sundstein | 2 |
| 11. Marita Petersen | 1,6 |

**Verið løgmenn + landsstýrismenn:**

| | |
|---|---|
| Atli Dam | 17,8 |
| Kristian Djurhuus | 14 |
| Anfinn Kallsberg | 11 |
| Jóannes Eidesgaard | 10 |
| Hákun Djurhuus | 10 |
| Jógvan Sundstein | 5 |
| Marita Petersen | 3,6 |

## Listin sær soleiðis út:

| | Landsstýrisfólk | ár | | Landsstýrisfólk | ár |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Jákup Lindenskov | 11 | 38 | Hans Pauli Strøm | 4 |
| 2 | Niels Winther Poulsen | 8 | 39 | Bjørn Kalsø | 3,9 |
| 3 | Eilif Samuelsen | 8 | 40 | Bárður Nielsen | 3,3 |
| 4 | Bjarni Djurholm | 8 | 41 | Signar á Brunni | 3 |
| 5 | Sámal Petur í Grund | 7 | 42 | Svend Aage Ellefsen | 3 |
| 6 | Hákun Djurhuus | 6 | 43 | Helena Dam á Neystabø | 3 |
| 7 | Sámal Petersen | 6 | 44 | Jógvan Sundstein | 3 |
| 8 | Dánjal Pauli Danielsen | 6 | 45 | Marita Petersen | 2 |
| 9 | Demmus Hentze | 6 | 46 | Jóan Petur Davicsen | 2 |
| 10 | Ivan Johannesen | 6 | 47 | Louis Zachariassen | 2 |
| 11 | John Petersen | 6 | 48 | Ásbjørn Joensen | 2 |
| 12 | Jóannes Eidesgaard | 6 | 49 | Hergeir Nielsen | 2 |
| 13 | Eyðun Elttør | 6 | 50 | Heðin M. Klein | 2 |
| 14 | Karsten Hansen | 6 | 51 | Jógvan Ingvard Olsen | 2 |
| 15 | Høgni Hoydal | 6 | 52 | Andrias Petersen | 2 |
| 16 | Finnbogi Ísakson | 5 | 53 | Finnbogi Arge | 2 |
| 17 | Vilhelm Johannesen | 5 | 54 | Páll á Reynatúgvu | 2 |
| 18 | Olaf Olsen | 5 | 55 | Bill Justinussen | 2 |
| 19 | Anfinn Kallsberg | 5 | 56 | Jógvan við Keldu | 1,75 |
| 20 | Jóngerð Purkhús | 5 | 57 | Óli Jacobsen | 1,6 |
| 21 | Kristian Djurhuus | 4 | 58 | Kristian Magnussen | 1,5 |
| 22 | Richard Long | 4 | 59 | Villi Sørensen | 1,2 |
| 23 | Edward Mitens | 4 | 60 | Thorstein Petersen | 1 |
| 24 | Karsten Hoydal | 4 | 61 | Ole Jacob Jensen | 1 |
| 25 | Erlendur Patursson | 4 | 62 | Bergur Jacobsen | 1 |
| 26 | Eli Nolsøe | 4 | 63 | Axel Nolsøe | 1 |
| 27 | Peter F. Christiansen | 4 | 64 | Óli Holm | 1 |
| 28 | Petur Reinert | 4 | 65 | Tórbjørn Jacobsen | 1 |
| 29 | Tórbjørn Poulsen | 4 | 66 | Annlis Bjarkhamar | 1 |
| 30 | Páll Vang | 4 | 67 | Atli Dam | 0,8 |
| 31 | Niels Pauli Danielsen | 4 | 68 | Karolina Petersen | 0,8 |
| 32 | Lasse Klein | 4 | 69 | Magni Laksafoss | 0,7 |
| 33 | Jógvan Djurhuus | 4 | 70 | Tordur Niclasen | 0,4 |
| 34 | Thomas Arabo | 4 | 71 | Karl Heri Joensen | 0,4 |
| 35 | Jacob Vestergaard | 4 | 72 | Annita á Fríðriksmørk | 0,25 |
| 36 | Jørgen Niclasen | 4 | 73 | Heðin Zachariassen | 0,17 |
| 37 | Jógvan á Lakjuni | 4 | 74 | Johan Dahl | 0,1 |




Hesin flokkur hevur løgmann

*Samgongurnar frá 1948 - 2008*